

# KOMMUNUVAL

2024

Týsdagin 12. november 2024 verður kommunuval. Í hesum bóklingi er ymiskt tilfar savnað saman í sambandi við kommunuvalið.

# Innihaldsyvirlit

Lóggáva ..... 2
Kommunuvallógin ..... 2
Løgtingsvallógin – Kapittul XII ..... 11
Ymiskt tilfar ..... 14
Ofta settir spurningar ..... 14
Valevnislisti ..... 16
Freistir í sambandi við kommunuvalið 2024 ..... 17

# Lóggáva

## Kommunuvallógin

Løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. september 2020

I Valrættur og valbæri.

II. Fyrireikingar til valið.

III Valkort

IV Valevnislistar.

V. Atkvøðingarøki.

VI Atkvøðuseðlar.

VII Valhøli, atkvøðurúm og atkvøðukassar.

VIII Atkvøðugreiðslan.

IX Atkvøðuteljingin.

X Uppgerð av valinum.

XI Valklagur, frítøka undan vali og innkallan av tiltaksmanni.

Kapittul XIa Um val í sambandi við kommunusamanlegging

XII. Nývalda bygda(r)ráðið/býráðið.

### I Valrættur og valbæri.

**§ 1.** Valrætt og valbæri til bygda(r)ráðsval/býráðsval hevur hvør tann, sum
a) Hevur fylt 18 ár og annars lýkur hinar treytirnar fyri valrætti og valbæri til løgtingið.
b) er tilmeldaður fólkayvirlitið í avvarðandi kommunu í seinasta lagi 2 vikur áðrenn tann dagin, valið fer fram.
c) og sum valdagin framvegis er búsitandi í kommununi.
*Stk. 2.* Hóast stk. 1, litra a, hava ríkisborgarar úr øðrum londum valrætt og valbæri til kommunuval, um so er, at teir hava havt fastan bústað í Føroyum seinastu 3 árini undan valinum.
*Stk. 3.* Hóast stk. 1, litra a, hevur persónur, sum er undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir Værgemålsloven § 6, sum sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan, valrætt og valbæri til kommunuval.
*Stk. 4.* Eingin, sum stendur ikki á vallistanum, kann útinna valrætt.
*Stk. 5.* Um onkur er komin á vallistan, men sum ikki longur er fastbúgvandi í kommununi, hevur hann ikki rætt til at velja.

**§ 2.** Bygda(r)áðslimirnir/býráðslimirnir verða valdir fyri 4 ár, og allir limir fara frá í senn.
*Stk. 2.* Hendir tað, at limur doyr ella av aðrari orsøk fer frá, áðrenn 4-ára valskeiðið er farið, verður møguligi eftirmaður hansara bert at sita ta tíð, ið eftir er av valskeiðinum.
*Stk. 3.* Regluligt val fer fram annan týsdag í november, og valskeiðið gongur frá 1. januar árið eftir.

## II. Fyrireikingar til valið.

**§ 3.** Valið verður fyrireikað og fyriskipað undir leiðslu av eini valnevnd, sum sett er av bygda(r)ráðnum/býráðnum. Nevndin hevur í minsta lagi 3 limir og skipar seg sjálv. Nevndin sitir sama tíðarskeið sum bygdarráðið/býráðið. Bygda(r)ráðslimur/býráðslimur ella persónur, sum er uppskotin sum valevni, kann ikki vera limur í valnevndini.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin lýsir í minsta lagi 6 vikur fyri valdagin:
1) nær, ið valdagurin er,
2) hvar valevnislistar skulu latast inn og
3) seinastu freist at lata valevnislistar inn.
*Stk. 3.* Í seinasta lagi eina viku framman undan valinum almannakunnger valnevndin stað og klokkutíð fyri valið. Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00, ella so leingi veljarar møta uttan steðg.
*Stk. 4.* Eingin má av arbeiðsgevara vera so mikið bundin, at hann fær ikki høvi til at velja.

**§ 4.** Valið verður fyrireikað við listum yvir veljararnar. Vallistin verður gjørdur í seinasta lagi 1. september í tí ári, sum valið fer fram, yvir teir veljarar, ið tá lúka treytirnar fyri valrætti, og so skjótt sum valdagurin er ásettur, verður gjørdur eykalisti yvir teir persónar, sum, aftan á at høvuðsvallistin er gjørdur og til valið fer fram, ætlast valdagin at lúka aldurstreytina og hinar treytirnar fyri valrætti, sbr. § 1.
*Stk. 2.* Vallistarnir verða gjørdir í 2 eintøkum, sum verða at goyma hvørt fyri seg, og teir skulu verða merktir „Vallisti til kommunuval“.
*Stk. 3.* Í seinasta lagi 4 vikur framman undan valinum skulu vallistarnir verða framlagdir til alment eftirlit, og teir verða liggjandi frammi í 2 vikur á einum staði, ið liggur høgliga fyri hjá íbúgvarunum. Lýst verður um hetta á vanligan hátt 5 vikur framman undan valinum.
*Stk. 4.* Kæra um, at onkur av órøttum er komin á listan, ella onkur rættkomin ikki er tikin við, skal í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin verða send bygda(r)ráðnum/býráðnum, sum kannar og tekur endaliga avgerð í málinum.
*Stk. 5.* Vísir tað seg, eftir at freistin í stk. 4 er farin, at onkur rættkomin ikki er tikin við á listan, ella at onkur av órøttum er komin á listan, kann hetta rættast til og við valdagin.

## III Valkort

**§ 5.** Bygda(r)ráðið/býráðið kann gera av, at valkort verða send út til veljararnar. Tey skulu innihalda upplýsingar um navn og bústað veljarans og talnummar hansara á vallistanum, og tey skulu verða útsend í seinasta lagi 2 vikur framman undan valinum.

## IV Valevnislistar.

**§ 6.** Atkvøðugreiðslan fer fram sambært valevnislistum, har ávísir persónar eru uppskotnir sum valevni.
*Stk. 2.* Valevnislistarnir mugu vera valnevndarformanninum ella kommununi í hendi í seinasta lagi kl. 18.00, 3 vikur undan valdegnum.
*Stk. 3.* Listin skal vera undirskrivaður av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi, bústaði og føðingardegi. Er íbúgvaratalið í kommununi minni enn 1000, eru 10 stillarar nóg nógvir. Er íbúgvaratalið minni enn 200, eru 5 stillarar nóg nógvir. Listin skal vera latin inn av einum stillara, og hesin hevur rætt til á einum avriti av valevnislistanum at fáa kvittan frá formanninum

ella kommununi fyri, at listin er móttikin og nær. Ein persónur kann bert vera stillari á einum lista. Er ein persónur stillari á fleiri listum, verður hann at strika á øllum.
*Stk. 4.* Ein listi kann hava færri og í mesta lagi 4 valevni fleiri enn tað samlaða talið av bygda(r)ráðslimum/býráðslimum, ið skulu verða valdir. Um henda treyt verður ikki hildin, skal listin verða lýstur ógildugur. Um talið á valevnum á øllum listunum samanlagt ikki er 2 fleiri enn talið á bygdarráðslimum/býráðslimum, ið skulu verða valdir, skal valnevndin, tá uppstillingarfreistin er úti, gera ein valevnislista, so talið á valevnum kemur upp á tað ásetta.
*Stk. 5.* Valevnini skulu vera skilliga lýst við navni, starvi, bústaði og føðingardegi, so at eingin samanblanding við nakran annan valbæran persón stendst av. Er okkurt valevni ikki valbært, ella er tað so óskilliga lýst, at ivi kann vera um, hvønn valbæran persón sipað verður til, verður navn hansara strikað av listanum.
*Stk. 6.* Heldur valnevndin, at ein rættstundis innlatin valevnislisti er so ófullfíggjaður, at neyðugt er at gera hann ógildugan, skal nevndin beinanvegin boða viðkomandi stillara frá hesum og geva honum høvi til innan 24 tímar at bøta um brekið.
*Stk. 7.* Er ein persónur uppstillaður á fleiri listum, skal valnevndin siga honum frá hesum. Hann kann tá skrivliga yvirfyri valnevndini siga frá, um hann bert vil standa á einum lista og hvørjum. Valnevndin skal hava gjørt honum tað kunnugt seinast 12. dagin undan valinum, og skal hann hava svarað valnevndini seinast 11. dagin undan valinum, so stillararnir á hinum listunum, sum viðkomandi stóð á, kunnu fáa høvi til innan 24 tímar at seta annað valevni í hansara stað.
*Stk. 8.* Um valevnislisti verður lýstur ógildur, ella um valevni ella stillari verður strikaður av listanum, skal henda avgerð nevndarinnar, sum er endalig, verða skrivað í valbókina, og úrskrift úr henni um hetta skjótast møguligt, og í øllum førum fyri valið, verða send tí stillara, sum listan hevur latið inn.

**§ 7.** Teir av valnevndini góðkendu valevnislistar fáa hvør sær eitt bókstavframerki (A, B, C o.s.fr.), og á hvørjum lista verður sett talnummar (1, 2, 3 o.s.fr.) framman fyri hvørt valevni í somu raðfylgju, sum tey av stillarunum eru uppsett. Bókstavaframerking hjá flokki, sum hevur rætt at taka lut í løgtingsvali, eigur at vera sami bókstavur, sum flokkurin áður hevur nýtt í sambandi við løgtingsval.

## V. Atkvøðingarøki.

**§ 8.** Bygda(r)ráðini/býráðini kunnu gera av, at kommunan verður býtt upp í tvey ella fleiri atkvøðingarøki, soleiðis at atkvøðugreiðslan og uppteljingin av atkøvðunum fara fram í hvørjum øki sær.
*Stk. 2.* Somuleiðis kunnu nú bygda(r)ráðini/býráðini gera av, at eitt atkvøðingarøki verður niðurlagt. Avgerð um hetta verður at lýsa í bløðunum ella á annan fullgóðan hátt.
*Stk. 3.* Meðan atkvøðugreiðslan í kommununum, sum ikki eru býttar upp í fleiri atkvøðuøki, fer fram undir leiðslu av teirri av bygda(r)ráðnum/býráðnum valdu valnevnd, sbr. § 3, so verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygda(r)ráðnum/býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall. Bygda(r)ráðslimur/býráðslimur ella persónur, sum er uppskotin sum valevni, kann ikki vera limur í valstýrinum.

## VI Atkvøðuseðlar.

**§ 9.** Til valdagin og valstaðin útvegar valnevndin neyðugt tal av atkvøðuseðlum, sum allir skulu vera til staðar í valhølinum, tá valið byrjar.
*Stk. 2.* Atkvøðuseðilin skal vera soleiðis háttaður, at ikki sæst í gjøgnum hann, og hann skal í skilligum prenti innihalda upplýsing um valdag og valár, bókstav- og møguligt floksfrámerki (vallisti A, vallisti B, vallisti C o.s.fr.) í so nógvum reglum, sum talið av valevnislistum, og harumframt nøvnini á øllum valevnum í somu raðfylgju og við somu nummarmerking, sum tey eru lýst á valevnislistunum, sí tó niðanfyri undir § 10.
*Stk. 3.* Valevnislistarnir skulu verða skildir hvør frá øðrum við prentaðari grovari striku, meðan nøvnini á valevnunum verða skild hvørt frá øðrum við tunnari prentaðari striku.
*Stk. 4.* Einki annað orð, bókstavur ella frámerki má vera á nøkrum atkvøðuseðli, hvørki við prenti, skrift ella á annan hátt.

**§ 10.** (Strikað).

## VII Valhøli, atkvøðurúm og atkvøðukassar.

**§ 11.** Atkvøðugreiðslan fer fram í einum ella fleiri hølum, sum bygda(r)ráðið/býráðið ávísir, har atkvøðurúm í neyðugum tali eru sett upp. Atkvøðurúmini skulu vera soleiðis háttað, at ongin hevur møguleika fyri uttanífrá at síggja, hvussu avvarðandi hevur atkvøtt. Atkvøðurúmini skulu vera útgjørd við tí, sum er neyðugt fyri at atkvøða.
*Stk. 2.* Á valstøðunum – bæði í sjálvum valhølinum og í atkvøðurúmunum – skulu frá tí valið byrjar, yvirlit yvir valevnini við bókstavi og nummar teirra verða uppslignir. Somuleiðis skal verða uppsligin ein prentað vegleiðing fyri veljararnar, sum skal innihalda tær greinir í hesi lóg, sum mestan týdning hava fyri sjálvt valið.
*Stk. 3.* Valnevndin útvega ein ella fleiri atkvøðukassar, ið skulu vera læstir, meðan atkvøðugreiðslan fer fram, og annars soleiðis háttaðir, at eingin atkvøðuseðil kann verða tikin uppúr, uttan kassin verður latin upp.

## VIII Atkvøðugreiðslan.

**§ 12.** Valið byrjar við, at formaðurin í valnevndini/valstýrinum ger kunnugt nøvnini á limum nevndarinnar, talið á bygda(r)ráðslimum/býráðslimum, ið skulu verða valdir og teir sbr. § 6 móttiknu valevnislistar. Formaðurin vísir fram atkvøðukassarnar, soleiðis at tað sæst, at teir eru tómir, og síðan verða teir læstir.
*Stk. 2.* Undir eftirliti av nevndarformanninum verður førd ein valbók. Í valbókina verður at føra inn alt tað, ið týdning hevur fyri valið, serliga talið á innkomnum valevnislistum við nøvnunum á valevnunum í somu raðfylgju sum á listanum, talið á atkvøðuseðlum, ið nýttir skulu verða til valið, talið á gildum og ógildum seðlum hvørjir sær, atkvøðutølini fyri hvønn valevnislista og hvørt valevni, og nøvnini á teim valdu valevnunum. Tá ið valið er lokið, verður valbókin í varðveitslu hjá bygda(r)ráðnum/býráðnum.
*Stk. 3.* Tey, ið hjástødd eru í valhølinum, meðan valið fer fram, hava skyldu at lýða boðum formansins, soleiðis at valið í allar mátar kann fara fram siðiliga.

**§ 13.** Veljararnir koma fram at valborðinum soleiðis, sum teir vilja sjálvir og sum høvi gevst at atkvøða. Eftir at valnevndin (valstýrararnir ella hjálparfólkið) hava vissað sær, at veljarin er tann, sum hann sigur seg at vera, og at hann stendur á vallistanum, verður hann avmerktur á vallistanum

samstundis sum ein annar hjálparmaður skrivar upp navn og valnummar veljarans á serligan lista í somu raðfylgju, sum veljararnir verða avgreiddir. Síðan verður atkvøðuseðil útflýggjaður.
*Stk. 2.* Í kommunu, har valkort eru send út til veljararnar, sbr. § 5, skal veljarin, samstundis sum hann verður avmerktur á vallistanum, lata inn valkortið, áðrenn atkvøðuseðilin verður flýggjaður honum, og tann í stk. 1 nevndi serligi listi er tá ikki neyðugur. Hevur veljarin ikki valkortið við sær, verður nýtt kort at skriva, sum so verður lagt saman við teim kortum, sum latin eru inn, ella serligur listi verður at føra í hesum førum.
*Stk. 3.* Tá veljarin hevur fingið atkvøðuseðilin útflýggjaðan, fer hann beinan vegin inn í atkvøðurúmið, har eingin annar má vera inni (sí tó § 15). Her fer atkvøðugreiðslan fram á tann hátt, at veljarin setir kross annaðhvørt fyri tí lista, hann ætlar at velja, ella fyri einum av valevnunum á hesum sama lista.
*Stk. 4.* Veljarin leggur nú atkvøðuseðilin soleiðis saman, at eingin annar sær, hvussu atkvøtt er og koyrir hann beinan vegin í atkvøðukassan, meðan ein av nevndini ella ein hjálparmaður hennara sær.
*Stk. 5.* Tað er strangliga bannað limum í valnevndini ella hjálparfólki hennara at gera seg kunnugar við, hvussu veljari hevur atkvøtt.

**§ 14.** Veljarar, ið vilja taka lut í valinum valdagin, mugu møta persónliga; tó kunnu sjófólk, sjúk og aðrir persónar, ið hava ikki møguleika at greiða atkvøðu á valstaðnum sjálvan valdagin, greiða atkvøðu eftir somu reglum, sum galdandi eru fyri val til Føroya løgtings við innsending av brævatkvøðum.

**§ 15.** Um veljari møtir til val og sigur seg ikki føran fyri einsamallan at greiða atkvøðu á ásettan hátt, kann hann fáa hjálp til hetta frá tveimum limum í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólkum.
*Stk. 2.* Um veljari ikki er førur fyri at koma sær inn í valhølið, kann hann krevja, at atkvøðugreiðslan fer fram beint uttan fyri valhølið, og skulu í hesum føri tveir persónar, sum eru limir í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólk vera hjástaddir, og um neyðugt veita honum hjálp við atkvøðugreiðsluni.
*Stk. 3.* Veljarin kann krevja, at annar av persónunum, sum veitir hjálp við atkvøðugreiðsluni, sbrt. stk. 1 ella 2, verður skiftur út við ein persón, sum veljarin sjálvur vísir á.
*Stk. 4.* Limir í valnevndini, valstýrinum, hjálparfólk og persónar, sum veljarin sjálvur vísir á, hava tagnarskyldu, tá ið teir veita hjálp sbrt. stk. 1-3

**§ 16.** Um atkvøðuseðil aftan á at vera útflýggjaður veljaranum, men áðrenn hann er koyrdur í atkvøðukassan, vísir seg at vera ónýtiligur, ella hann av óansni ella misgávum verður gjørdur ónýtiligur, kann veljarin móti at lata inn aftur hin upprunaliga seðilin fáa nýggjan seðil og greiða atkvøðu av nýggjum. Tann ónýtiligi seðilin verður gjørdur ógildur.
*Stk. 2.* Tá ið steðgur kemur í atkvøðugreiðsluna aftan á ta klokkutíð, sum ásett er at enda valið, sbr. § 3, skal valið verða lýst liðugt, tó soleiðis at limir valnevndarinnar og hjálparfólk hennara tá beinan vegin hava rætt til at atkvøða og lata inn egnu atkvøðuseðlar sínar.
*Stk. 3.* Eingin veljari, sum atkvøtt hevur, skal hava skyldu fyri rættinum í nøkrum føri at geva upp, hvørjum hann hevur atkvøtt fyri, ella um hann hevur atkvøtt fyri ella ímóti einum valevni.
*Stk. 4.* Eingin limur í valnevndini ella nakar annar, ið hjástaddur er í valhølinum, har atkvøðuseðlar verða útflýggjaðir, hevur loyvi at geva veljarum ráð, ávísing ella tilelving um, hvønn teir skulu velja. Heldur ikki má nakar, sum á valstaðnum fær kunnleika um, hvønn ein veljari hevur valt, geva hesa vitan sína víðari.
*Stk. 5.* Tað er forboðið floksskivstovum ella øðrum miðvíst at kanna eftir, um veljarar møta fram til atkvøðugreiðslu.
*Stk. 6.* Brot upp á tær í stk. 4 og 5 nevndu fyriskipanir verða revsað við sekt ella fongsli.

## IX Atkvøðuteljingin.

**§ 17.** So skjótt sum atkvøðugreiðslan er av, fer atkvøðuteljingin fram. Hon er almenn.
*Stk. 2.* Í kommunum, sum býttar eru upp í tvey ella fleiri atkvøðuøki, fer teljingin fram í hvørjum øki sær undir leiðslu av formanninum fyri teirra av bygda(r)ráðnum/býráðnum setta serliga stýri (valstýrarar) sbr. § 8, stk. 3, meðan teljingin í kommunum, sum eru ikki soleiðis uppbýttar, fer fram undir leiðslu av valnevndini.
*Stk. 3.* Áðrenn atkvøðuteljingin byrjar, verða atkvøðuseðlarnir tiknir upp úr atkvøðukøssunum, og verða teir síðan blandaðir og býttir javnt millum neyðugt tal av teljingarbólkum, samansettir av valnevndarlimum, valstýrarum og hjálparfólki nevndarinnar. Hvør bólkur sær leggur í rúgvur fyri seg atkvøðuseðlar, sum greiddir eru fyri sama valevnislista, og telur so upp, hvussu nógvar atkvøður hvør av valevnislistunum hevur fingið við atkvøðugreiðsluna. Ein atkvøðuseðil er givin fyri tí valevnislista, innan fyri hvørs teigi veljarin hevur sett kross. Verður ivi um gildi av einum atkvøðuseðli, ella um hvørjum valevnislista atkvøtt er fyri, verður hesin atkvøðuseðil ikki taldur við í fyrsta umfari, men verður lagdur til viks fyribils. Formaðurin fyri valnevndini ella valstýrunum tekur ikki sjálvur lut í hesum parti av teljingini, men hann skal ansa eftir, at hon fer fram á rættan og tryggan hátt.
*Stk. 4.* Tá teir einstaku teljingarbólkarnir eru lidnir við teljingina av teim atkvøðuseðlum, sum býttir eru út til bólkin, verður teljingarúrslitið saman við teim ivasomu atkvøðuseðlunum givið formanninum fyri valnevndini ella valstýrarunum.
*Stk. 5.* Valnevndin ella valstýrararnir taka síðan avgerð, um teir ivasomu atkvøðuseðlarnir skulu verða roknaðir sum gildir ella ikki. Ein atkvøðuseðil er ógildur.

a) um tað ikki við vissu sæst, hvønn valevnislista veljarin hevur viljað atkvøtt fyri,
b) um atkvøðuseðilin er øðrvísi vorðin enn teir, sum útflýggjaðir eru til atkvøðugreiðsluna,
c) um á atkvøðuseðilin er skrivað annað enn ein krossur ella valevnisnavn, sbr. § 10 og § 13, ella um atkvøðuseðlinum við vilja er givið slíkt eyðkenni, at tað sæst, hvør veljarin er.

Verður ein atkvøðuseðil vrakaður, skal grundin til hetta verða førd í valbókina.

**§ 18.** Valnevndin ella valstýrararnir gera síðan upp úrslitið av atkvøðugreiðsluni við at leggja saman stakúrslitini frá teljingarbólkunum og aftrat hesum at leggja teir av valnevndini ella valstýrarunum góðkendu ivasomu atkvøðuseðlar.
*Stk. 2.* Í kommunum, sum uppbýttar eru í tvey ella fleiri atkvøðingarøki, verður úrslitið av atkvøðuteljingini í hvørjum valstaði gjørt kunnugt fyri teim hjástøddu og skjótast gjørligt fráboðað formanni valnevndarinnar. Í hesum kommunum kemur valnevndin saman í seinasta lagi dagin eftir, at atkvøðugreiðslan er farin fram, fyri at gera upp atkvøðuteljingina í øllum atkvøðingarøkjum kommununar. Hesin fundur er almennur. Fyri hvørt atkvøðingarøki tekur formaðurin fyri valstýrarunum lut í fundinum, og skal hann hava við sær úrskrift úr valbók valstýraranna saman við øllum atkvøðutilfarinum.
*Stk. 3.* Valnevndin ger nýggja teljing og meting av teim í atkvøðingarøkinum givnu atkvøðuseðlum eftir reglunum í § 17, og ger síðan ta endaligu uppgerðina yvir úrslitið av atkvøðugreiðsluni; hetta verður ført í valbókina og gjørt kunnugt fyri teim hjástøddu.
*Stk. 4.* Í kommunum, sum eru ikki býttar upp í fleiri atkvøðingarøki, verður úrslitið av atkvøðuteljingini beinan vegin ført í valbók nevndarinnar og kunngjørt fyri teim hjástøddu.
*Stk. 5.* Samlaða atkvøðutalið (gildar, ógildar og umskiftir atkvøðuseðlar) verður borið saman við tann í § 13, stk. 1, nevnda lista yvir teir veljarar, ið atkvøtt hava, ella við tey í somu §, stk. 2 nevndu valkort.

## X Uppgerð av valinum.

**§ 19.** Endalig uppgerð av valinum verður síðan gjørd av valnevndini annaðhvørt sama dag, sum atkvøðuteljingin er farin fram, ella í seinasta lagi dagin eftir.
*Stk. 2.* Fyrst skal verða avgjørt, hvussu nógv valevni skulu verða vald fyri hvønn valevnislista. Samlaða atkvøðutalið fyri hvønn valevnislista verður at býta við 1, 2, 3 o.s.fr., til hvørt atkvøðutalið er býtt við tali eins stórum og talið á sessum, sum avvarðandi valevnislisti kann hugsast at fáa í mesta lagi. Hægsta býtingartalið, sum soleiðis kemur fram, gevur tí lista, sum fær tað í sín lut, rætt til lim nr. 1, næsthægsta býtingartalið gevur tí lista, sum fær tað í sín lut, rætt til lim nr. 2, og so framvegis, til talið á limum, ið valdir skulu verða, er býtt millum teir ymisku valevnislistarnar.
Standa býtingartølini á jøvnum, skal lutakast fara fram; lutakastið verður tikið av formanni valnevndarinnar, meðan tey, ið hjástødd eru, síggja.
*Stk. 3.* Er valevnislisti, ið eigur næsta lim, tømdur, verður hesin limur tikin av tí lista, sum liggur næstur í býtingartali.

**§ 20.** Av hvørjum einstøkum lista verða teir valdu limirnir tiknir eftir persónliga atkvøðutali teirra.
*Stk. 2.* Tey valevni á einum valevnislista, sum eru ikki vald, verða roknað sum tiltaksmenn fyri tey, sum eru á sama lista, eftir persónliga atkvøðutali teirra og taka sess í bygda(r)ráðnum/býráðnum í somu raðfylgju í staðin fyri teir limir, ið valdir eru, um so verður, at onkur av hesum doyr ella av aðrari orsøk fer frá sum limur av bygda(r)ráðnum/býráðnum.
*Stk. 3.* Fer bygdaráðslimur/býráðslimur frá í valskeiðinum, og er ongin tiltaksmaður, skal landsstýrið skipa fyri vali av so mongum limum sum resta í, at bygdaráðið/býráðið er fullmannað uttan so, at meira enn helmingurin av upprunaliga limatalinum samtykkir, at hetta ikki er neyðugt.
*Stk. 4.* Við tílíkt val galda somu reglur sum við vanligt kommunuval. Tó kann landsstýrið um neyðugt víkja frá teimum í lógini tilskilaðu tíðarfreistum.

**§ 21.** Tá valið er endaliga gjørt upp, førir formaður valnevndarinnar inn í valbókina gjølligar upplýsingar um tað, soleiðis at skilað verður til hvussu atkvøðurnar skiftust til teir ymsu valevnislistarnar, í hvørjum nummarrað sessirnir lutaðust teimum, hvussu mangar persónligar atkvøður hvørt valevni hevur fingið, hvørjir limir, ið valdir eru, og limanummarið sbr. § 19, stk. 2, sum hvør av teimum hevur fingið; somuleiðis verða nøvnini á teimum valevnum, sum ikki vórðu vald, førd inn í valbókina, sum verður undirskrivað av allari valnevndini.
*Stk. 2.* Valbókin verður latin bygda(r)ráðnum/býráðnum. Somuleiðis verður alt atkvøðutilfarið latið bygda(r)ráðnum/býráðnum til nýtslu undir møguligari fínteljing. Um so verður, at bygda(r)ráðið/býráðið ger av, at fínteljing skal vera, skal hon fara fram í seinasta lagi vikudagin eftir sjálvan valdagin.
*Stk. 3.* Atkvøðutilfarið verður goymt av bygda(r)ráðnum/býráðnum, til kærufreistin er farin, ella møgulig klaga um valið er endaliga viðgjørd og støða til hana tikin; síðan skal tilfarið verða forkomið.

**§ 22.** Valnevndin boðar teimum valdu frá valinum og sigur samstundis hvørjum einstøkum limi frá, hvørjum limanummari hann er valdur við.
*Stk. 2.* Um onkur hevur verið limur av bygda(r)ráðnum/býráðnum í 8 ár ella meiri, hevur hann ikki skyldu at taka við endurvali, fyrr enn 2 fylgjandi valskeið eru liðin; somuleiðis kann persónur, ið fylt hevur 60 ár, bera seg undan at taka við vali.
*Stk. 3.* Annars hevur hvør persónur, sum valbærur er, skyldu at taka við vali.
*Stk. 4.* Er tað, tá valevnislisti verður latin inn, greitt at eitt valevni lýkur treytirnar fyri at sleppa undan vali, skal váttan frá avvarðandi valevni um at taka við vali fylgja við.

## XI Valklagur, frítøka undan vali og innkallan av tiltaksmanni.

**§ 23.** Hann, ið hevur nakað at kæra seg um viðvíkjandi vali, sum fram er farið, má, fyri at klaga hansara kann verða tikin til viðgerðar í seinasta lagi 8 dagar eftir, at valið er gjørt endaliga upp, skrivliga seta fram mótmæli sítt fyri bygda(r)ráðnum/býráðnum.
*Stk. 2.* Tey mótmæli, ið framsett eru í samsvari við frammanfyri standandi reglur, verða gjørd av bygda(r)ráðnum/býráðnum á fundi, ið hildin skal verða í seinasta lagi 10 dagar eftir, at frestin er farin. Áðrenn bygda(r)ráðið/býráðið tekur avgerð sína, verður ummæli valnevndarinnar um málið at fáa.

**§ 24.** Umframt í teimum førum, sum nevnd eru í § 22, stk. 2, kann bygda(r)ráðið/býráðið játta umsókn frá persónum, sum vegna ringa heilsu, starv ella virki teirra ella tílíkt hava góða grund til at biðja um at sleppa undan vali.
*Stk. 2.* Um onkur av teim valdu ynskir at sleppa undan at taka við vali, sbr. § 22, stk. 2, og frammanfyri í stk. 1, skal hann innan fyri somu frest, sum galdandi er fyri innsendan av klagum, sbr. § 23, stk. 1, skrivliga venda sær til bygda(r)ráðið/býráðið, sum viðger og tekur avgerð í málinum á sama hátt, sum nevnt í § 23, stk. 2, viðvíkjandi klagum.
*Stk. 3.* Kommunustýrislimur skal eftir umbøn sleppa úr bygda(r)ráðnum/býráðnum, um hesin vegna ringa heilsu, starv ella virki sítt ella tílíkt hevur góða grund til at sleppa úr bygda(r)ráðnum/býráðnum.
*Stk. 4.* Tær avgerðir, sum bygda(r)ráðið/býráðið hevur tikið viðvíkjandi klagum um valið, sbr. § 23, stk. 1, og. innkomnum umsóknum um at sleppa undan vali og áheitanum um at sleppa úr bygda(r)ráðnum/býráðnum, kunnu, áðrenn 14 dagar eru lidnir, eftir at avgerðin er tikin, verða skotnar inn fyri landsstýrismannin.

**§ 25.** Um valið við endaligu avgerðina verður lýst ógilt, verður umval at fara fram skjótast gjørligt. Við umval kunnu bert teir persónar á vallistanum velja, sum valrætt høvdu tann dagin, tað sum ógilt lýsta valið fór fram. Við umval er mannagongdin annars hin sama sum við fyrra valið.

## Kapittul XIa
## Um val í sambandi við kommunusamanlegging

**§ 25a.** Valrætt og valbæri til kommunuval, har kommunur leggja saman, hevur hvør tann, sum er meldaður til fólkayvirlitið í einum av teimum kommununum, ið leggja saman, í seinasta lagi 2 vikur áðrenn valdagin, og annars lýkur treytirnar í § 1.

**§ 25b.** Um kommunur leggja saman, skal nýggj felags valnevnd veljast at skipa fyri valinum. Valnevndin skal hava í minsta lagi 3 limir og skipar seg sjálv. Nevndin situr sama tíðarskeið sum bygda(r)ráðið/býráðið.
*Stk. 2.* Koma samanleggjandi kommunurnar ikki ásamt um val av valnevnd, ger landsstýrismaðurin av.

**§ 25c.** Í samanleggjandi kommunu, har bara eitt valstað er frammanundan, verður sitandi valnevnd broytt til valstýri. Eru fleiri valstøð standa verandi valstýri við, og sitandi valnevndin fellur burtur, sbr. tó § 25b, stk. 1.
*Stk. 2.* Hóast stk. 1 kunnu samanleggjandi kommunur gera av at velja valstýri av nýggjum.

**§ 25d.** Talið av veljarum, ið skulu skriva undir valevnislistarnar sambært § 6, stk. 3, skal vera í mun til samlaða talið av íbúgvum í samanleggjandi kommunum.

**§ 25e.** Mál viðvíkjandi klagum um valið, áheitanir um at sleppa undan at taka við vali og mál um innkalling av tiltaksmanni, sbr. kap. XI, verða viðgjørd av kommunustýrinum í tí kommununi, har valið, ið klagað verður um, hevur verið, ella í tí kommununi, har persónurin býr, sum ynskir at sleppa undan at taka við vali.
*Stk. 2.* Fer eitt bygda(r)ráð/býráð ikki frá 31. desember orsakað av reglunum í § 26, stk. 1, so halda eisini gomlu bygda(r)ráðini/býráðini í hinum samanleggjandi kommununum fram á sama hátt.

## XII. Nývalda bygda(r)ráðið/býráðið.

**§ 26.** Tá vanligt val til bygda(r)ráð/býráð er farið fram, fara teir gomlu limirnir í bygda(r)ráðnum/býráðnum frá 31. desember, uttan so at klaga um valið er sett fram, áðrenn tann í § 23, stk. 1, ásetta klagufreist er farin. Um so er, fer gamla bygda(r)ráðið/býráðið ikki frá, fyrr enn tað hevur viðgjørt og tikið avgerð viðvíkjandi framsettu klaguni – og um tað er bygda(r)ráðið/býráðið sjálvt, sum lýsir valið ógilt, fer tað ikki frá, fyrr enn umval hevur verið, og møguligar klagur um umvalið eru viðgjørdar og avgerð tikin av bygda(r)ráðnum/býráðnum.
*Stk. 2.* So skjótt sum teir gomlu limirnir eru fráfarnir, tekur nýggja bygda(r)ráðið/býráðið við. Um so verður, at valið seinri verður lýst ógilt eftir avgerð av hægri myndugleika – Føroya landsstýri – skal nývalda bygda(r)ráðið/býráðið halda fram, inntil umval hevur verið, og møguligar klagur um umvalið eru viðgjørdar og avgerð tikin.
*Stk. 3.* Fyrstu ferð nývalda bygda(r)ráðið/býráðið skal koma saman, verða limirnir boðaðir til henda fundin av fyrstvalda liminum.
*Stk. 4.* Um limur fyribils sigur frá sær fasta bústað sín í kommununi, kann verða samtykt, at hann bert fer úr bygda(r)ráðnum/býráðnum, inntil hann aftur tekur fastan bústað í kommununi.

**§ 27.** Bygda(r)ráðslimur/býráðslimur, sum av eini ella aðrari orsøk ikki longur lýkur treytirnar fyri valbæri til bygda(r)ráðsval/býráðsval, skal leggja frá sær. Avgerð um hetta verður tikin av bygda(r)ráðnum/býráðnum.
*Stk. 2.* Limur, sum ímóti sínum vilja verður noyddur at fara frá sum bygda(r)ráðslimur/býráðslimur, kann skjóta avgerðina inn fyri Føroya landsstýri til endaliga avgerð.

**§ 28.** Bygda(r)ráðið/býráðið kann veita samsýning til valnevndarlimir, valstýrarar og hjálparfólkið fyri ta tíðina, valið og atkvøðuteljingin taka.
*Stk. 2.* Kommunan rindar sjálv allar útreiðslur, sum standast av valinum.

**§ 29.** Henda lóg fær gildi beinan vegin. Samstundis fara úr gildi lógarkunngerð nr. 200 frá 17. juli 1931 „landkommunal valglov“ við seinni broytingum og §§ 5-19 í lóg nr. 126 frá 27. mai 1908 „om byen Thorshavns kommunale styrelse“.
*Stk. 2.* Val sambært hesi lóg fer tó fyrstu ferð fram týsdagin 21. november 2000.

# Løgtingsvallógin – Kapittul XII

Løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 72 frá 14. mai 2019

[I. Tinglimir og valdømir]

[II. Valrættur og valbæri]

[III. Vallistar og valkort]

[IV. Løgtingsvalnevnd]

[V. Útskriving av vali]

[VI. Valevnislistar]

VII. Atkvøðuseðlar

VIII. Valstøð, valstýrir, valhøli v.m.

IX. Atkvøðugreiðsla á valdegnum

X Atkvøðuteljingin

XI. Uppgerð av valinum

XII. Atkvøðugreiðsla við brævi

XIII. Vanligar reglur

**XII. Atkvøðugreiðsla við brævi.**

**§ 35.** Veljarar, ið ynskja at velja, men sum valdagin ikki kunnu møta persónliga á valstaðnum at greiða atkvøðu, herundir sjófólk, sjúk og onnur, ið ikki hava møguleika at greiða atkvøðu á valstaðnum valdagin, kunnu greiða atkvøðu við innsending av brævatkvøðu eftir reglunum í §§ 36-43.

**§ 36.** Veljarar, sum staddir eru í Føroyum, kunnu greiða atkvøðu á einum fólkayvirliti, eisini í heimstaðkommununi, har veljarin stendur á vallista. Sjófólk kunnu eisini atkvøða hjá einum mynstringarstjóra. Veljarar, sum ynskja at greiða brævatkvøðu eftir kapittul XII, skulu, um hetta verður mett neyðugt, vísa nøktandi samleikaprógv.
*Stk. 2.* Veljarar, ið liggja á sjúkrahúsi ella øðrum heilsu- ella uppihaldsstovni ella eru undir læknaviðgerð heima, kunnu greiða atkvøðu á sjúkrahúsinum ella stovninum, ella hjá viðkomandi lækna ella tveimum av valstýrinum útnevndum álítandi persónum, sum báðir skulu hava við sær samleikaprógv umframt útnevningina.
*Stk. 3.* Veljarar, ið sita í varðhaldi, kunnu greiða atkvøðu hjá løgregluni.
*Stk. 4.* Veljarar, ið staddir eru uttanlands, kunnu greiða atkvøðu á donskum sendistovum ella konsulátum í útheiminum, ella hjá einum, sum landsstýrismaðurin hevur heimilað.
*Stk. 5.* Veljarar, ið staddir eru í hinum partinum av ríkinum, kunnu greiða atkvøðu á støðum, sum har vera nýtt til atkvøðugreiðslu við brævi.
*Stk. 6.* Sjófólk kunnu greiða atkvøðu umborð á viðkomandi skipi.

**§ 37.** Sjófólk og onnur, sum ikki halda seg verða heima valdagin, og veljarar, sum eru staddir uttanlanda, kunnu útfylla atkvøðuseðilin í fyrsta lagi 4 mánaðar áðrenn valdagin. Í øðrum førum skal atkvøðuseðilin vera útfyltur í fyrsta lagi 1 viku áðrenn valdagin.
*Stk. 2.* Atkvøðugreiðsla við brævi kann í seinasta lagi fara fram dagin fyri valdagin, og atkvøðuseðilin skal vera komin fram til valstaðið, áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar.

**§ 38.** Til atkvøðugreiðslu við brævi útvegar landsstýrismaðurin neyðugar atkvøðuseðlar við tilhoyrandi brævbjálvum og oyðubløð til fylgibrøv umframt størri konvoluttar, sum fylgibræv og brævbjálvi við atkvøðuseðlinum skal sendast í til kommununa.
*Stk. 2.* Atkvøðuseðlarnir skulu vera av hvítum pappíri, við orðunum "atkvøðuseðil" prentað á aðrari síðuni. Brævbjálvarnir skulu vera sovorðnir, at ikki sæst ígjøgnum teir, og so stórir, at teir heilt skjúla atkvøðuseðilin. Á forsíðuni á størra brævbjálvanum skal vera prentað, at hann inniheldur ein atkvøðuseðil til løgtingsval, og á baksíðuni skal vera prentaður teigur, har veljarin setur navn sítt og bústað í kommununi, har hann stendur á vallista.

**§ 39.** Atkvøðugreiðslan er bert gildug, um hon fer fram við nýtslu av seðlum, fylgibrøvum og brævbjálvum, sum landsstýrismaðurin hevur útvegað. Atkvøðugreiðslan fer fram á tann hátt, at veljarin vendir sær til ein av teimum niðanfyri í stk. 2 tilskilaðu persónum. Aftaná at hava prógvað hvør hann er, fær hann flýggjaðan ein atkvøðuseðil við tilhoyrandi brævbjálva, fylgibrævi og størri brævbjálva. Á atkvøðuseðilin setur hann beinanvegin aftaná móttøkuna og uttan at nakar annar er hjástaddur antin navnið á einum valevni, sum er uppstillað, møguliga við tilskilan av flokki, ella navnið ella bókstavamerkingina hjá einum flokki, sum hevur valevni uppstillað. Beinanvegin aftaná at veljarin hevur greitt atkvøðu, leggur hann, uttan at nakar annar sær, hvussu hann hevur atkvøtt, atkvøðuseðilin í tann tilhoyrandi brævbjálvan og klistrar hann aftur.
*Stk. 2.* Tað í § 38, stk. 1, nevnda fylgibræv verður útfylt beinanvegin aftaná at atkvøðuseðilin er lagdur í brævbjálvan. Fylgibrævið skal innihalda:

1) Eina váttan um, at veljarin sjálvur, sjálvboðin og uttan at nakar annar er hjástaddur, hevur útfylt atkvøðuseðilin, lagt hann í brævbjálvan og klistrað hann aftur. Veljarin skal eisini undir trúnaðartreytum vátta, at hann valdagin ikki ella bert við stórum tvørleika kann møta á valstaðnum innan fyri tær fyri atkvøðugreiðsluna ásettu tíðarfreistir. Undirskrift veljarans á fylgibrævið skal fara fram, meðan hjástaddur er ein konsulentembætismaður ella ein, sum landsstýrismaðurin hevur tilnevnt, um veljarin er uttanlands, avvarðandi skipari ella næstimaður hansara, tá veljarin er sjómaður og atkvøtt verður umborð, mynstringarstjóri, tá atkvøtt verður áðrenn burturferð, avvarðandi manntalsskrivari ella varamaður hansara, og viðvíkjandi sjúkum á sjúkrahúsi ella øðrum heilsustovnum, læknin, og heima læknin, ella tveir av valstýrinum til tess uppnevndir persónar. Fylgibrævið skal dagfestast og tilskila veljarans navn og bústað í kommununi, har hann stendur á vallista.
2) Eina váttan frá tí ella teimum, ið hjástødd hava verið, tá ið fylgibrævið er undirskrivað, um, at undirskriftin er sonn, og at staðar- og dagfestingin er bein, og at atkvøðugreiðslan er farin fram, uttan at onnur hava verið hjá. Váttanin skal vera undirskrivað við egnari hond og við tilskilan av fullum navni, starvi og bústaði.

*Stk. 3.* Teir í stk. 2 nevndu persónar hava skyldu til at ansa eftir, at útflýggjaðir atkvøðuseðlar v.m., beinanvegin verða nýttir og flýggjaðir aftur samsvarandi §§ 38 og 39. Tann, ið misrøkir hetta, verður revsaður eftir § 45.
*Stk. 4.* Um veljarin sigur seg ikki føran fyri at fylla út atkvøðuseðilin ella fylla út og undirskriva fylgibrævið sum ásett, kann hann fáa hjálp til hetta frá persóni, sum skal taka ímóti tilfarinum. Veljarin kann krevja, at ein persónur, sum veljarin sjálvur vísir á, eisini er til staðar í teimum førum, veljarin hevur tørv á hjálp.

**§ 40.** Tá ið veljari hevur atkvøtt, og fylgibrævið er rætt útfylt og váttað, leggur hann brævbjálvan við atkvøðuseðlinum og fylgibrævið í tann størra brævbjálvan, sum hann klistrar aftur og setur frímerki á. Eisini útfyllir hann teigin á baksíðuni á størra brævbjálvanum týðiliga við navni og bústaði sínum í nevndu kommunu. Brævbjálvin verður síðani handaður honum, sum atkvøtt er hjá. Hesin reikar uttan neyðugan steðg fyri, at brævbjálvin verður sendur avvarðandi kommunu. Atkvøðugreiðslan má fara fram í so góðari tíð, at kann reika fyri, at brævbjálvin er komin valstýrinum í hendi í góðari tíð, áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar.

**§ 41.** Kommunustýrið savnar innkomnu brævbjálvarnar og innførir avsendaranavn og bústað og tíð, tá ið brævatkvøðan er móttikin, í eina bók, ið er útvegað til hetta endamál. Brævbjálvarnir verða sendir óopnaðir til valstýrið fyri tí valstaði, har veljarin eftir uppgivna bústaðnum á brævbjálvanum hevur atkvøðurætt. Brævbjálvarnir skulu vera valstýrinum í hendi, áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar.

**§ 42.** Áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar, verða móttiknu brævbjálvarnir opnaðir av valstýrinum, sum kannar um persónurin, ið brævbjálvin er frá, stendur á vallistanum, og um so er verður beinanvegin settur krossur við navn veljarans á vallistanum samstundis við at navn og nummar hansara verður skrivað á atkvøðulistan, smbr. § 24, stk. 1. Eru fleiri brævbjálvar frá sama veljara, verður bert brævbjálvin við seinast dagfesta fylgibrævi roknaður uppí.
*Stk. 2.* Vísir tað seg við hesi kanning, at viðkomandi ikki hevur valrætt, ella verður upplýst, at hann áðrenn valdagin er deyður, verður tann óopnaði brævbjálvin við tilhoyrandi fylgibrævi lagdur aftur í tann størra brævbjálvan, og atkvøðan verður ikki roknað uppí. Sama er galdandi, um størri brævbjálvin inniheldur annað ella meira enn eitt fylgibræv og ein brævbjálva, ella tað eftir útsjóndini á størra brævbjálvanum, fylgibrævinum ella brævbjálvanum er orsøk til at halda, at tey ikki hoyra til tað tilfar, sum landsstýrismaðurin hevur útvegað, ella tað ikki, hvat viðvíkir útfylling, váttan, undirskrift ella innsending er farið fram sum fyriskrivað.
*Stk. 3.* Teir brævbjálvar, sum verða at rokna uppí, verða goymdir saman við tilhoyrandi fylgibrævi og størra brævbjálvanum, til atkvøðugreiðslan er endað. Brævbjálvarnir verða síðan koyrdir í ein atkvøðukassa og blandaðir millum hinar atkvøðuseðlarnar og verða ikki opnaðir, fyrr enn uppteljingin ger hetta neyðugt.
*Stk. 4.* Brævatkvøður, sum valstýrið fær aftaná at atkvøðugreiðslan er byrjað, verða liggjandi óopnaðar, og verða ikki roknaðar uppí.
*Stk. 5.* Til ta í § 30 tilskilaðu uppgerð av valinum skulu bæði brævbjálvar, fylgiskriv og atkvøðuseðlar finnast.

**§ 43.** Umrøddu atkvøðuseðlar eru ógildugir:
1) Um tað ikki við vissu kann gerast av, hvat valevni ella hvønn flokk veljarin hevur viljað atkvøtt fyri,
2) um ein brævbjálvi inniheldur annað ella meira enn ein atkvøðuseðil,
3) um tað eftir útsjóndini á atkvøðuseðlinum er orsøk til at halda, at hann ikki er ein av teimum, sum landsstýrismaðurin hevur útvegað, ella at tað ikki er farið fram sum fyriskrivað í lógini undir útfyllingini av seðlinum.

# Ymiskt tilfar

## Ofta settir spurningar

### Um valrætt, valbæri, vallista o.a.

1. Hava lesandi, sum búgva uttanlands, valrætt til kommunuval?
   *Svar:* Nei. Fólk, sum búgva uttanlands, koma ikki á vallistan og lúka ikki treytirnar fyri at kunna atkvøða til kommunuval. Tú kanst lesa meir um valrætt við at klikkja her.

2. Hvat er ein vallisti?
   *Svar:* Ein vallisti er ein listi yvir teir veljarar, ið lúka treytirnar fyri valrætti.

### At stilla upp til kommunuval

3. Hvat er ein valevnislisti?
   *Svar:* Atkvøðugreiðsla fer fram eftir valevnislistum, har ávísir persónar eru uppskotnir sum valevni.
   Stillarar: Valevnislistar skulu vera undirskrivaðir av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum. Er íbúgvaratalið minni enn 1000, eru 10 stillarar nóg nógvir. Er íbúgvaratalið minni enn 200, eru 5 stillarar nóg nógvir. Ein persónur kann bert vera stillari á einum lista.
   Valevni: Ein valevnislisti kann hava í mesta lagi 4 valevni fleiri enn tað samlaða talið av kommunustýrislimum, ið skulu verða valdir. Um talið av valevnum á øllum listum samanlagt ikki er 2 fleiri enn talið á kommunustýrislimum, ið skulu verða valdir, skal valnevndin gera ein valevnislista, so talið á valevnum kemur upp á tað ásetta.

4. Nær og hvar skulu valevnislistar latast inn?
   *Svar:* Valevnislistar mugu vera valnevndarformanninum ella kommununi í hendi í seinasta lagi tann 22. oktober 2024, kl. 18.00. Listin skal vera latin inn av einum stillara.

5. Hvussu nógvir kommunustýrislimir skulu vejlast?
   *Svar:* Kommunustýrislógin ásetur, at talið á kommunustýrislimum, sum í minsta lagi skal vera 7 og í mesta lagi 17, verður ásett í kommunustýrisskipanini. Talið av kommunustýrislimum skal vera stakt. Undantak: Í kommunum við færri enn 500 íbúgvum verður talið á kommunustýrislimum 5. Í kommunum við 100 íbúgvum ella færri skulu tó einans veljast 3 kommunustýrislimir.

6. Er tað ein borgaraskylda, at stilla upp til kommunuvalið?
   *Svar:* Ja. Um ein persónur, sum er valbærur, er skotin upp sum valevni á einum valevnislista, hevur viðkomandi skyldu at taka við vali. Tað finnast undantøk hesum viðvíkjandi:

a. Persónur, sum hevur verið limur av kommunustýrinum í 8 ár ella meiri, hevur ikki skyldu at taka við endurvali, fyrr enn tvey fylgjandi valskeið eru liðin.
b. Persónur, sum er 60 ár, kann somuleiðis bera seg undan at taka við vali.
c. Um persónur vegna ringa heilsu, starv ella virki sítt ella tílíkt hevur góða grund til at biðja um at sleppa undan vali, kann kommunustýrið játta viðkomandi at sleppa undan vali.

## Atkvøða við brævi

7. Hvar og nær kunnu veljarar greiða atkvøðu við brævi?
   *Svar:* Viðvíkjandi reglunum um atkvøðu við brævi eru tær somu reglurnar galdandi sum til løgtingsval.

8. Kann veljari greiða brævatkvøðu fleiri ferðir?
   *Svar:* Ja. Eru fleiri brævatkvøður frá sama veljara, verður bert brævbjálvin við seinast dagfesta fylgibrævi roknaður uppí.

9. Kann veljari, sum hevur greitt brævatkvøðu, atkvøða á valstaðnum á sjálvum valdegnum?
   *Svar:* Ja. Um veljari, sum hevur greitt brævatkvøðu, ynskir at greiða atkvøðu á sjálvum valstaðnum á valdegnum, verður brævatkvøðan ikki rokna uppí.

## Uppgerð av valinum

10. Nær verður úrslitið av valinum gjørt upp?
    *Svar:* So skjótt atkvøðugreiðslan er av, fer atkvøðuteljingin fram, og tá ið atkvøðuteljingin er liðug, ger valnevndin ella valstýrið úrslitið upp.

11. Nær er ein atkvøðuseðil ógildur?
    *Svar:* Ein atkvøðuseðil er ógildur
    - *um* tað ikki við vissu sæst, hvønn valevnislista veljarin hevur viljað atkvøtt fyri,
    - *um* atkvøðuseðilin er øðrvísi vorðin enn teir, sum útflýggjaðir eru til atkvøðugreiðsluna og
    - *um* á atkvøðuseðilin er skrivað annað enn ein krossur við ein lista ella valevnisnavn, ella um atkvøðuseðilin við vilja er givið slíkt eyðkenni, at tað sæst, hvør veljarin er.

    Ein brævatkvøða eru ógild

    - *um* tað ikki við vissu kann gerast av, hvat valevni ella hvønn flokk veljarin hevur viljað atkvøtt fyri,
    - *um* ein brævbjálvi inniheldur annað ella meira enn ein atkvøðuseðil, ella

*um* tað eftir útsjóndini á atkvøðuseðlinum er orsøk til at halda, at hann ikki er ein av teimum, sum landsstýrismaðurin hevur útvegað, ella at tað ikki er farið fram sum fyriskrivað í lógini undir útfyllingini av seðlinum.

## Valevnislisti (vegleiðandi dømi)

Hesi verða stillaði upp sum valevni til kommunuvalið 12. november 2024 fyri ______________________

(møguligt floksnavn)

| | **Fult navn** | **Starv** | **Bústaður** | **Føðingardagur** | **Møgulig váttan[1]** |
|---|---|---|---|---|---|
| **1** | | | | | |
| **2** | | | | | |
| **3** | | | | | |
| **4** | | | | | |
| **5** | | | | | |
| **6** | | | | | |
| **7** | | | | | |
| **8** | | | | | |
| **9** | | | | | |
| **10** | | | | | |
| **11** | | | | | |
| **12** | | | | | |
| **13** | | | | | |
| **14** | | | | | |
| **15** | | | | | |
| **16** | | | | | |
| **17** | | | | | |

**Stillarar[2]**

| | **Fult navn** | **Starv** | **Bústaður** | **Føðingardagur** | **Undirskrift** |
|---|---|---|---|---|---|
| **1** | | | | | |
| **2** | | | | | |
| **3** | | | | | |
| **4** | | | | | |
| **5** | | | | | |
| **6** | | | | | |
| **7** | | | | | |
| **8** | | | | | |
| **9** | | | | | |
| **10** | | | | | |
| **11** | | | | | |
| **13** | | | | | |
| **14** | | | | | |
| **15** | | | | | |
| **16** | | | | | |
| **17** | | | | | |
| **18** | | | | | |
| **19** | | | | | |
| **20** | | | | | |
| **21** | | | | | |
| **22** | | | | | |
| **23** | | | | | |
| **24** | | | | | |
| **25** | | | | | |

[1] Um onkur hevur verið limur av bygda(r)ráðnum/býráðnum í 8 ár ella meiri, hevur hann ikki skyldu at taka við endurvali, fyrr enn 2 fylgjandi valskeið eru liðin; somuleiðis kann persónur, ið fylt hevur 60 ár, bera seg undan at taka við vali. Annars hevur hvør persónur, sum valbærur er, skyldu at taka við vali. Er tað, tá valevnislisti verður latin inn, greitt at eitt valevni lýkur treytirnar fyri at sleppa undan vali, skal váttan frá avvarðandi valevni um at taka við vali fylgja við.

[2] Listin skal vera undirskrivaður av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi, bústaði og føðingardegi. Er íbúgvatalið í kommununi minni enn 1000, eru 10 stillarar nóg nógvir. Er íbúgvatalið minni enn 200, eru 5 stillarar nóg nógvir.

## Freistir í sambandi við kommunuvalið 2024

| Dagur | Hending | Heimild |
|---|---|---|
| 12. juli 2024 | Sjófólk og onnur, sum ikki rokna seg at vera heima valdagin, og veljarar, sum eru staddir uttanlands, kunnu útfylla atkvøðuseðilin í fyrsta lagi 4 mánaðir áðrenn valdagin. Í øðrum førum skal atkvøðuseðilin vera útfyltur í fyrsta lagi 1 viku áðrenn valdagin (t.e. 5. november 2024). | § 37, stk. 1 í løgtingsvallógini, sbr. § 14 í kom.vallógini |
| 1. september 2024 | Vallistin verður gjørdur í seinasta lagi 1. september í tí ári, sum valið fer fram, yvir teir veljarar, ið tá lúka treytirnar fyri valrætti. | § 4, stk. 1 |
| 1. oktober 2024 | Landsstýrismaðurin lýsir í minsta lagi 6 vikur fyri valdagin: 1) nær valdagurin er, 2) hvar valevnislistar skulu latast inn og 3) seinastu freist at lata valevnislistar inn. | § 3, stk. 2 |
| 1. oktober 2024 | So skjótt sum valdagurin er ásettur, verður gjørdur eykalisti yvir teir persónar, sum, aftan á at høvuðsvallistin er gjørdur og til valið fer fram, ætlast at lúka aldurstreytina og hinar treytirnar fyri valrætti valdagin, sbr. § 1 í lógini. | § 4, stk. 1 |
| 8. oktober 2024 | Lýst verður um framløgu av vallistunum á vanligan hátt 5 vikur framman undan valinum. | § 4, stk. 3 |
| 15. oktober 2024 | Í seinasta lagi 4 vikur framman undan valinum skulu vallistarnir vera framlagdir til alment eftirlit, og teir verða liggjandi frammi í 2 vikur á einum staði, ið liggur høgliga fyri hjá íbúgvarunum. Lýst verður um hetta á vanligan hátt 5 vikur framman undan valinum. | § 4, stk. 3 |
| 22. oktober 2024 | Valevnislistarnir mugu vera valnevndarformanninum ella kommununi í hendi í seinasta lagi kl. 18.00, 3 vikur undan valdegnum. | § 6, stk. 2 |
| 29. oktober 2024 | Bygda(r)ráðið/býráðið kann gera av, at valkort verða send út til veljararnar. Tey skulu innihalda upplýsingar um navn og bústað veljarans og talnummar hansara á vallistanum, og tey skulu verða útsend í seinasta lagi 2 vikur framman undan valinum. | § 5 |
| 29. oktober 2024 | Valrætt og valbæri til bygda(r)ráðsval/býráðsval hevur hvør tann, sum a) hevur fylt 18 ár og annars lýkur hinar treytirnar fyri valrætti og valbæri til løgtingið, b) er tilmeldaður fólkayvirlitið í avvarðandi kommunu í seinasta lagi 2 vikur áðrenn tann dagin, valið fer fram, og c) sum valdagin framvegis er búsitandi í kommununi.<br><br>Hóast ásetingina í a), hava ríkisborgarar úr øðrum londum valrætt og valbæri til kommunuval, um so er, at teir hava havt fastan bústað í Føroyum seinastu 3 árini undan valinum.<br><br>Hóast ásetingina í a), hevur persónur, sum er undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir Værgemålsloven § 6, sum er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan, valrætt og valbæri til kommunuval. | § 1, stk. 1, 2 og 3 |

| | | |
|---|---|---|
| 31. oktober 2024 | Er ein persónur uppstillaður á fleiri listum, skal valnevndin siga honum frá hesum. Hann kann tá skrivliga siga valnevndini frá, um hann bert vil standa á einum lista og hvørjum. Valnevndin skal hava gjørt honum tað kunnugt seinast 12. dagin undan valinum, og skal hann hava svarað valnevndini seinast 11. dagin undan valinum, so stillararnir á hinum listunum, sum viðkomandi stóð á, kunnu fáa høvi til innan 24 tímar at seta annað valevni í hansara stað. | § 6, stk. 7 |
| 1. november 2024 | Seinasta freist hjá teimum, ið eru uppstillaði á fleiri listum at svara valnevndini, so stillararnir á hinum listunum, sum viðkomandi stóð á, kunnu fáa høvi til innan 24 tímar at seta annað valevni í hansara stað. | § 6, stk. 7 |
| 5. november 2024 | Í seinasta lagi eina viku framman undan valinum almannakunnger valnevndin stað og klokkutíð fyri valið. Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00, ella so leingi veljarar møta uttan steðg. | § 3, stk. 3 |
| 5. november 2024 | Kæra um, at onkur av órøttum er komin á listan, ella onkur rættkomin ikki er tikin við, skal í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin vera send bygda(r)ráðnum/býráðnum, sum kannar og tekur endaliga avgerð í málinum. Vísir tað seg, eftir at omanfyri nevnda freist er farin, at onkur rættkomin ikki er tikin við á listan, ella at onkur av órøttum er komin á listan, kann hetta rættast til og við valdagin. | § 4, stk. 4 og 5 |
| 5. november 2024 | Sjófólk og onnur, sum ikki halda seg verða heima valdagin, og veljarar, sum eru staddir uttanlands, kunnu útfylla atkvøðuseðilin í fyrsta lagi 4 mánaðar áðrenn valdagin. Í øðrum førum skal atkvøðuseðilin vera útfyltur í fyrsta lagi 1 viku áðrenn valdagin. | § 37, stk. 1 í løgtingsvallógini, sbr. §14 í kom.vallóg. |
| 11. november 2024 | Seinasta freist at atkvøða við brævi.<br><br>Atkvøðuseðilin skal vera komin fram til valstaðin, áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar. | § 37, stk. 2 í løgtingsvallógini sbr. § 14 í kom.vallóg |
| 12. november 2024, áðrenn atkvøðu-greiðslan byrjar | Atkvøðuseðilin skal vera komin fram til valstaðin, áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar. | § 37, stk. 2 í løgtingsvallógini |
| 12. november 2024 | Regluligt val fer fram annan týsdag í november, og valskeiðið gongur frá 1. januar árið eftir.<br><br>Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00, ella so leingi veljarar møta uttan steðg. | § 2, stk. 3<br><br>§ 3, stk. 3 |
| 12. november 2024 | So skjótt sum atkvøðugreiðslan er av, (t.e. kl. 20 ella seinni) fer atkvøðuteljingin fram. Hon er almenn. | § 17, stk. 1 |
| 12. ella 13. november 2024 | Endalig uppgerð av valinum verður síðan gjørd av valnevndini annaðhvørt sama dag, sum atkvøðuteljingin er farin fram, ella í seinasta lagi dagin eftir. | § 19, stk. 1 |
| 13. november 2024 | Í kommunum, sum uppbýttar eru í tvey ella fleiri atkvøðuøki, verður úrslitið av atkvøðuteljingini í hvørjum valstað gjørt kunnugt fyri teim hjástøddu og skjótast gjørligt fráboðað formanni valnevndarinnar. Í hesum kommunum kemur valnevndin saman í seinasta lagi dagin eftir, at atkvøðugreiðslan er farin fram, fyri at gera upp atkvøðuteljingina í øllum atkvøðuøkjum kommununnar. Hesin fundur er almennur. | § 18, stk. 2 |

| | | |
|---|---|---|
| 19. november 2024 | Um so verður, at bygda(r)ráðið/býráðið ger av, at fínteljing skal vera, skal hon fara fram í seinasta lagi vikudagin eftir sjálvan valdagin. | § 21, stk. 2 |
| 21. november 2024 | Hann, ið hevur nakað at kæra seg um viðvíkjandi vali, sum fram er farið, má, fyri at klaga hansara kann verða tikin til viðgerðar í seinasta lagi 8 dagar eftir, at valið er gjørt endaliga upp, skrivliga seta fram mótmæli sítt fyri bygda(r)ráðnum/býráðnum. | § 23, stk. 1 |
| 21. november 2024 | Um onkur av teim valdu ynskir at sleppa undan at taka við vali, sbr. § 22, stk. 2, og frammanfyri í stk. 1, skal hann innan fyri somu freist, sum galdandi er fyri innsendan av klagum, sbr. § 23, stk. 1, skrivliga venda sær til bygda(r)ráðið/býráðið, sum viðger og tekur avgerð í málinum á sama hátt, sum nevnt í § 23, stk. 2, viðvíkjandi klagum. | § 24, stk. 2. |
| 1. desember 2024 | Tey mótmæli, ið framsett eru í samsvari við frammanfyri standandi reglur, verða gjørd av bygda(r)ráðnum/býráðnum á fundi, ið hildin skal verða í seinasta lagi 10 dagar eftir, at frestin er farin. Áðrenn bygda(r)ráðið/býráðið tekur avgerð sína, verður ummæli valnevndarinnar um málið at fáa. | § 23, stk. 2 |
| 14 daga freist | Tær avgerðir, sum bygda(r)ráðið/býráðið hevur tikið viðvíkjandi klagum um valið, sbr. § 23, stk. 1, og innkomnum umsóknum um at sleppa undan vali og áheitanum um at sleppa úr bygda(r)ráðnum/býráðnum, kunnu, áðrenn 14 dagar eru lidnir, eftir at avgerðin er tikin, verða skotnar inn fyri landsstýrismannin. | § 24. stk. 4 |
| 31. desember 2024 | Tá vanligt val til bygda(r)ráð/býráð er farið fram, fara teir gomlu limirnir í bygda(r)ráðnum/býráðnum frá 31. desember, uttan so at klaga um valið er sett fram, áðrenn tann í § 23, stk. 1, ásetta klagufreist er farin. | § 26, stk. 1 |
| 31. desember 2024 | Nývalda bygda(r)ráð/býráð skal skipa seg í seinasta lagi innan árslok í valárinum. | § 12 í kommun-ustýrislógini |